## Nógv skip til Íslands

Talið á ferðamannaskipum, sum leggja at í Íslandi, verður so stórt í ár sum ongantíð fyrr. Sambært Morgunblaðnum fara minst 75 skip at leggja at í ymsum íslendskum havnum í 2007, og mett verður, at ferðafólkatalið verður oman fyri 60.000. Í fjør løgdu 74 útlendsk ferðamannaskip at í Íslandi, og higartil hava 75 boðað frá, at tey koma í ár. Tað fyrsta verður nýggja norska skipið Fram, sum leggur at í Reykjavík tann 26. mai á veg til Grønlands.

## Ósemja um skatt

Danska stórfelagið A.P. Møller-Mærsk er sera misnøgt við eina broyting í donsku skattalógini, tí felagið vil vera við, at broytingin fer at kosta oljuframleiðslu felagsins í Norðsjónum óriniliga nógvar pengar. Stjórnin sigur í sínum lagi, at sum heild kostar broytingin ikki A.P. Møller-Mærsk nakað, men hesum er felagið ikki samt við stjórnini í. Leiðslan í A.P. Møller-Mærsk vil tó ikki siga, hvussu stóran miss hon hevur roknað seg fram til.

Norðmenn eru úti um seg:

# Dansa samba og selja fisk í Rio de Janeiro

**Norska Útflutningsráðið setir stórar vónir til eitt slíkt tiltak og heldur, at tær umleið 5 miljónir krónurnar, sum luttøkan í Brasilia kostar, er ein góð íløga í marknaðarføringina av norskum fiskavørum**

MARKNAÐARFØRING
*Vilmund Jacobsen*
vilmund@sosialurin.fo

Norska fiskivinnublaðið Fiskaren hevur gjørt rættiliga fitt burtur úr norskum átaki í Brasiliu í sambandi við árliga karnevalin, ið er eitt stórt føstulávintstiltak.

Blaðið kallar greinina, sum fyllir tað mesta av tveimum síðum við myndum, fyri »I sambatakt for klipfisken«.

Stóri karnevalurin í Copacabana, sum liggur nær við Rio de Janeiro, byrjar 40 dagar fyri páskir, og er soleiðis eitt stórt og afturvendandi tiltak undan føstuni.

Tiltakið varar í einar fýra dagar, og við endan av tiltakinum er stór framførsla við kappingum millum dansiskúlar, sum verður víst í sjónvarpi.

### Marknaðarføring

Brasilia keypir stórar nøgdir av norskum klippfiski, og norðmenn halda, at tað hevur stóran týdning at vera við og gera vart við seg við eitt slíkt høvi, sum brasilianski karnevalurin er.

Ikki færri enn 40 norskir útflytarar vóru soleiðis við til karneval-tiltakið í Copacabana, og millum hesi vóru fleiri umboð fyri klippfiskaframleiðsluna í Ålesund.

- Tað er hugaliga og áhugavert at sleppa at umboða Ålesund undir slíkum umstøðum. Klippfiskurin hevur havt ómetaliga stóran týdning fyri býin síðan 1870. Brasilia hevur soleiðis verið við til at sett Ålesund í ein miðdepil, sigur borgarstjórin í Ålesund, Arve Tonning, sum eisini var við í norska ferðalagnum.

Tað var norska Útflutningsráðið, sum stóð á odda fyri norsku luttøkuni.

### Nógvir hyggjarar

Fiskaren metir, at umleið 2,3 miljardir fólk kring um heimin síggja upptøkurnar av endaligu framførsluni, tá samba-skúlar í Brasiliu kappast um at enda í fremstu røð. Væntandi er eisini, at eini 85 av 180 miljónum fólkum í Brasiliu síggja hesa framførslu á sjónvarpsskíggja.

Norska Útflutningsráðið setir tí stórar vónir til eitt slíkt marknaðarføringstiltak og heldur, at tær umleið 5 miljónir krónurnar, sum tiltakið kostar, eru ein góð íløga í marknaðarføringini av norskum fiskavørum í Brasiliu.




*"Norske tørrfiskeeksportører ta helt ut på karnevalet!" er høvuðsyvirskriftin í norska fiskivinnublaðnum Fiskaren 19. februar.*




*»I sambatakt for klippfisken« er yvirskriftin inni í blaðnum. Norðmenn síggja karnevalin í Brasiliu sum eitt gott høvi at marknaðarføra sínar fiskavørur*

